## Spøkilsi í Klaksvík

Í morgin, mikudagin 16. januar 2008, verður eitt óhugnaligt tiltak á Klaksvíkar Bókasavnið. Tá fer Steintór Rasmussen nevniliga at siga frá spøkilsissøgum. Steintór hevur sjálvur skrivað onkra av søgunum. Tiltakið er fyri børn í 9 til 12 ára aldri, og tað byrjar kl. 19.
Kelda: www.kunning.fo



## Samband og Tjóðveldi fremst

Ein meiningakanning, sum Gallup hevur gjørt fyri Dimmalætting, sigur, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldi fáa 18 av teimum 33 tinglimunum Sambandsflokkurin og Tjóðveldi høvdu havt meiriluta í Løgtinginum, var val í dag. Tað vísir ein veljarakanning, sum Gallup hevur gjørt, og sum stendur í Dimmalætting. Eftir kanningini høvdu teir báðir flokkarnir fingið níggju tinglimir í part og sostatt meiriluta í Tinginum. Tann stóri taparin sambært kanningini er Javnaðarflokkurin, sum fær 16 prosent og fimm tinglimir. Fólkaflokkurin fær góð 19 prosent og seks tinglimir, og Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin fáa hvør síni seks prosent og tveir tinglimir í part. Sambært kanningini hava rættiliga nógvir veljarar ikki tikið støðu enn. Tað eru serliga fólk, sum valdu Javnaðarflokkin ella Tjóðveldisflokkin seinast.

# var pengar

ikki, sigur Jón á Steig.

Tað gamla var, at læknin var ein alt-muligmand, sum kundi alt, men menningin - sum tey flestu uttan iva gleðast um - hevur ført við sær, at læknayrki er vorðið alt meira innviklað og spesialiserað, greiðir Jón á Steig frá. Í dag er læknin tí ikki alvitandi, men er serlækni í onkrum ávísum.

- Tað kann vera, at smærri sjúkrahúsini kunnu vera góðar uppvenjingarstøðir, tí tey hava nógv betri umstøður til slíkt enn Landssjúkrahúsið, men tað er fullkomiliga skilaleyst at hava hesi støð sum vakttung arbeiðspláss, staðfestir hann.

### Fólkavøkstur skal til

Tað er ikki fyrr enn fólkatali í Føroyum er fleirfalda, at vit kunnu byrja at hugsa um at hava eitt stórt sjúkrahús við fleiri serøkjum, heldur fráfarandi serlæknin.

Trupuleikin er bæði, at fólkatalið ikki er nóg stórt til at bera eitt stórt heilsuverk, og at ov fá starvsfólk eru tøk.

- Eg má siga, at tað sum hevur verið tungast at uppliva hesu seinastu árini er, at fólkatalið ikki veksur. Tá fólkavøksturin steðgar upp á henda hátt, so kunnu vit ikki tosa um framburð á nøkrum øki, heldur Jón á Steig.

- Eisini er tað hugtungt at vita, at vit kunnu vænta okkum læknatrot í minst 20 ár afturat.

- Evropeiska kappingin um læknar er hørð, og vit kunnu í besta fall vóna at fáa nakrar av føroysku læknunum heimaftur. Men tað krevur eitt høgt fakligt støði, og eitt slíkt fáa vit bert um vit veruliga raðfesta kvalitetin á arbeiðsplássinum, staðfestir Jón á Steig.

- Øll eru so mobil í dag, og føroyingar koma ikki heimaftur fyri ein hvønn prís. Vit kunnu fáa onkran at koma her, men trívist viðkomandi ikki, jamen so flytur hann bara av landinum aftur.

Í sambandi við starvsfólkamangul og royndirnar at fáa starvsfólk at trívast heldur Jón á Steig, at áhaldandi atfinningarnar hjá føroysku miðlunum kunnu skaða meira enn tær bøta.

- Um ein lækni verður svínaður til í pressuni, so kann hann bara taka flúgvaran og fara. Hvør orkar bara at fáa neiliga umrøðu, spyr Jón á Steig.

Hann sigur, at tað hevur verið ótrúliga nívandi at lesa allar tær keðiligu søgurnar.

- Eg haldi als ikki, at læknar skulu hava frið. Sjálvandi skulu trupulleikar viðgerast. Men tað er drepandi, tá viðgerðin er so einvegis, og vit einki fáa sagt afturímóti, sigur hann.

> *- Í Danmark siga tey, at minst 250.000 fólk skulu vera til hvørt sjúkrahús, og 48.000 kunnu kanska so dánt uppihalda eitt Landssjúkrahús hjá okkum. Tað er fullkomiliga óforsvarligt at hava trý sjúkrahús, staðfestir Jón á Steig*

### Sjúklingatrygging og viðgerðartrygd

Sosialurin hevur seinastu mánaðirnar viðgjørt sjúklingatryggingarlógina, sum var samtykt í 1989, men framvegis ikki er komin í gildi, og Jón á Steig skilir væl, at sjúklingar eru ørkymlaðir um hetta. Hann sigur, at sjúklingatryggingarlógin eisini er eitt framstig fyri læknar, tí við henni kunnu ivamál og skeivleikar viðgerast skjótt og siðiligt.

- Í fjølmiðlunum virkar tað, sum at læknarnir hava alla ábyrgdina, men tað er ikki altíð læknin sum hevur feilin. Feilurin kann eisini liggja í skipanini, í manglandi játtan ella hjá øðrum starvsbólkum. Tí er tað týdningarmikið, at vit fáa eina sjúklingatrygging, har skipanin tekur ábyrgd og álitið verður endur-upprættað so skjótt sum møguligt, sigur fyrrverandi yvirlæknin.

Hinvegin skilir hann ikki, at ávísir føroyskir politikarar eru farnir at tosa um at innføra viðgerðartrygd í Føroyum.

- Lars Løkke Rasmussen innførdi donsku lógina ímóti ráðum frá serfrøðingunum. Hetta er væl skiljandi, tí sálarliga trýsti av at bíða er stórt. Men hinvegin er eingi faklig grund fyri, at ein krabbameinssjúklingur til dømis skal viðgerast innan nakrar fáar dagar. Krabbameinið hevur mennt seg yvir fleiri ár, og tí hendir ikki tann stóra broytingin eftir nøkrum døgum, sigur Jón á Steig.

Kravið um at sjúklingar við ávísum sjúkum skulu viðgerast innan eitt ávíst tíðarsskeið leggur enn størri trýst á undirmannaðu sjúkrahúsini.

- Heilsuverkið er allatíðina ein spurningur um raðfesting. Og verður eitt øki uppraðfest, gongur tað út yvir okkurt annað. Hetta tí hvørki fíggjing ella manning eru óendalig. Hesum mugu politikarar gera sær greitt og ikki lata sum um støðan er ein onnur yvir fyri veljarunum, staðfestir Jón á Steig at enda.



*- Tað hevur mangan undrað meg, at proffesionella ráðgevingin ikki kemur upp ígjøgnum politisku skipanina. Ofta er tað tilvildin, sum hevur gjørt, at vit hava kunna ment okkum, sigur Jón á Steig, fyrrverandi yvirlækni á medisinsku deild á Landssjúkrahúsinum*